gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Signar reinsaður

### *Oddagrein*

ALLAR orsøkir eru til at ynskja Signar á Brúnni tillukku við kanningarúrslitinum. Signar er fullkomiliga reinsaður og sama er at siga um hansara embætismenn, ið saman við Signari gjørdu tað einasta rætta í eini sera torførari støðu undir stórum trýsti. Málið er pínligt fyri nógvar partar av politisku skipanini. Tað er fyri tað fyrsta pínligt fyri landsgrannskoðaran og løgtingsgrannskoðararnar, sum í teirra frágreiðing góvu løgtinginum ivasamar upplýsingar um sjónvarpsmálið.

EISINI Fíggjarnevndin hevur ein trupulleika. Tað tykist nú vera púra greitt, at nevndin hevði skyldu til at játta landsstýrismanninum pening til lønir o.a hjá Sjónvarpi Føroya. Men nevndin vísti málinum frá sær og sýndi harvið stórt ábyrgdarloysi. Málið er eisini pínligt fyri løgmann, ið lovaði Signari eina óhefta kanning, um Signar fór út á „síðulinjuna“ soleingi kanningin vardi. Tá Signar fór frá í áliti til, at løgmaður fór at halda sítt lyfti, sveik hann Signar.

MEST av øllum er málið pínligt fyri Tjóðveldisflokkin. Maktstríð er í øllum flokkum, men ljótari maktstríð enn hetta, er neyvan áður sæð í føroyskum politikki. Sjónvarpsmálið varð misbrúkt í innanhýsis valdsstríðnum í Tjóðveldisflokkinum frá fyrsta degi. Almenningurin var vitni til ein margháttligan leik. Atfinningarnar regnaðu niður yvir Signar á Brúnni, ikki frá politiskum mótstøðumonnum men frá parti av hansara egna flokki. Signar royndi til fánýtis at bedýra, at hann var ósekur. Orðini hjá sambandsmanninum Bjørn á Heygum vigaðu tyngri í Tjóðveldisflokkinum enn orðið hjá tí trúgva tjóðveldismanninum Signari. Hetta undraði mangan mann. Í dag byrja vit at skilja alt hetta spælið.

SJÓNVARPSMÁLIÐ kom sum ein gáva úr erva til tey, sum høvdu sett sær fyri at taka alt vald í Tjóðveldisflokkinum. Nýggi floksleiðarin gekk á odda at sáa iva um leiklutin hjá parta-manninum Signari á Brúnni. Honum á baki kom Tórbjørn Jacobsen, sum á forsíðuni í Dimmalætting nýtti óvanliga niðursetandi orð um Signar. Hetta spæl eydnaðist, og Signar var av sínum egnu tvungin út á „síðulinjuna“ við einum lyfti um at koma inn aftur í hitan, um kanningin reinsaði hann. Men Signar fekk ikki sína kanning frá løgmanni og høvdu nakrir tingmenn ikki tikið seg saman og víst ábyrgd og tryggjað Signari kanningina, stóð Signar á Brúnni í dag sum ein æruleysur maður. Sostatt fekk Signar takka verið einum ábyrgdarfullum løgtingi sína kanning og hann varð reinsaður. Hetta eiga øll at fegnast um. Eftir stendur tann stóri spurningurin, hví tað hevði so stóran skund at seta annan mann í Signarsa stað, meðan kanningin fór fram.

NIÐURSTØÐAN av hesum máli er, at Sjónvarpsgølan er gingin út yvir trúvirðið hjá stórum pørtum av politisku skipanini. Málið avdúkar eisini, at nýggja leiðslan í Tjóðveldisflokkinum hevur eina heilt serstaka fatan av rættartrygd. So kunnu vit spyrja: verður hetta rættartrygdin í fullveldinum?

*Sosialurin*

# Endamálið er at kroysta lívið burtur úr fleiri skipum

*– Bara fólk, sum ikki hava ánilsi fyri fiskiskapi, kunnu finna upp á slíkt. Missir ein lítil bygd ein trolara, fær tað líka álvarsligar avleiðingar fyri bygdina, sum tað hevði fingið fyri Havnina at Landssjúkrahúsið bleiv stongt, sigur Henrik Old*



*– Tað, sum landsstýrið førir fram er beinleiðis tvætl. Tað er at blaka torvmold í eyguni á fólki, sum ikki hava skil fyri tí, sigur Henrik Old.*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað eru bara fólk, sum ikki hava anilsi av fiskiskapi, sum kunnu finna uppá slíkt.

Henrik Old, framsøgumaður løgtingsins í fiskivinnumálum ivast onga løtu í, hvørja meining hann skal hava um ætlanina hjá landsstýrinum at tvinga lemmatrolararnar upp í fiskidagaskipanina.

Hann sigur, at verða teir tvingaðir upp í, fer tað at taka lívsgrundarlagið undan nógvum trolarum, og sostatt fer tað eisini at taka grundarlagið undan nógvum fiskimonnum.

– Og tað fer sostatt eisini at taka grundarlagið undan nógvum fiskavirkjum og harvið eisini undan nógvum arbeiðsfólki á landi.

–Endaliga niðurstøðan verður tí, at tað fer at taka lívsgrundarlagið undan nógvum føroyskum bygdum, tí missir ein bygd ein trolara, fer tað at fáa líka stórar avleiðingar fyri hana, sum tað hevði fingið fyri Havnina, um Landssjúkrahúsið stongdi.

Henrik Old sigur, at javnaðarflokkurin fer tí undir ongum umstøðum at taka undir við, at lemmatrolararnir verða tvingaðir upp í fiskidagaskipanina.

### Kroysta lívið úr fleiri trolarum

Henrik Old sigur, at allar royndir vísa, at ein skipan, har fiskirættindi kunnu seljast, er ein avtøkuskipan.

–Og tað er eisini tað, sum er endamálið við at fáa lemmatrolararnar upp í fiskidagaskipanina.

– Landsstýrið sigur beinleiðis, at lemmatrolaraflotin skal lagast til fiskiríkidømi.

– Tað merkir á vanligum máli, at flotin skal skerjast

– Sostatt er endamálið hjá landsstýrinum at kroysta lívið burturúr nøkrum av lemmatrolarunum fyri at flotin skal verða lagaður til fiskiríkidømið.

Henrik Old vísir á, at serliga fyri Suðuroynna og Vágoynna verður hetta ein óbótaligt bakkast, tí tað er í hesum økjum, at teir flestu lemmatrolararnir eru, og tað er her, at tey flestu virkini eru, sum arbeiða fiskin, teir avreiða.

Henrik Old fýlist eisini á, at Landsstýrið ger ongar sum helst royndir at lýsa, hvørjar alveiðingar tað fer at fáa fyri tey øki í landinum sum tað rakar, um nakrir av lemmatrolarunum verða kroystir úr flotanum.

– Hvørjar avleiðingar fer tað t.d. at fáa, um tað eydnast at kroysta annan, ella báðar hvalbiartrolararnar burturúr flotanum, spyr Henrik Old.

Hann leggur afturat, at royndirnar vísa eisini, at skipanin við seljandi fiskidøgum førir við sær, at fiskivinnan verður savnað á nøkrum fáum hondum í miðstaðarøkinum.

– So kann landsstýrið seta so nógvar útoyggjanevndir, tað vil, tí tað er alt til fánýtis, tá ið tann førdi politikkurin miðjar eftir at avtofta útjaðaran.

### Beinleiðis villleiðing

Landsstýrið skjýtir upp, at teir størru lemmatrolararnir fáa 80 fiskidagar í part á innaru leiðunum og at teir smærru fáa 100 dagar í part.

Men so kunnu teir býta ein dag á innaru leiðunum um við fýr dagar á teimum ytru leiðunum.

Hetta skuldi flutt veiðitrýstið á fiskastovnarar úteftir, og tað er eitt av endamálunum hjá landsstýrinum við at fáa lemmatrolararnar upp í fiskidagaskipanina.

– Hetta er beinleiðis tvætl, sigur Henrik Old.

Hann sigur, at hetta fer tvørturímóti at føra við sær, at veiðitrýstið verður flutt inn á grunnarnar i fer at harnað har.

– Nú verður tað onki sum eitur hjá lemmatrolarunum: Tað fer ikki at bera til hjá teimum at sigla langt til havs á fiskileið. Nú ræður tað um at fáa trolið í sjógvin sum skjótast.

– Tí fara lemmatrolararnir nú at fiska so nær landi, sum gjørligt. Tað verða teir heilt einfalt trýstir til.Tað er sjálvsagt, at færri dagar eitt skip hevur, skjótari vil tað hava greiðirnar í sjógvin.

– Tað fer heldur ikki at bera til hjá teimum at liggja og andøva í illveðri og telja dagar til onga nyttu.

– Hetta fer eisini at tvinga teir at royna at fiska í uppaftur verri veðri enn teir annars plaga, og at fiska í veðri, har teir annars høvdu ligið bakk, tí nú verður tað neyðugt at brúka hvørja løtu.

– Og tað kann eisini skjótt blíva ein spurningur um trygdina umborð.

### Kemur ikki til høldar

Henrik Old sigur at í sínari tíð blivu nógvir pengar brúktir uppá at varðveita lemmatrolararnar í flotanum, tá ið prísirnir vóru lágir.

– Tað var júst tí, at løgtingið ásannaði, at hesir trolararnir fingu fisk til høldar, sum annars ikki hevði verðið fiskaður. Teir skuldu rætt og slætt vera alternativið til vanliga botnfiskiskapin undir Føroyum.

Tí undrar tað hann, at landsstýrið ætlar at seta tiltøk í verk, sum fer at føra við sær, at blálonga, kongafiskur o.a, ikki fer at verða fiskað.

– Tað er ongin sum helst ivi um, at verða lemmatrolararnir avmarkaðir við fiskidøgum, fer nógv minni av fiski av djúpum vatni at koma til høldar, tí tað fer ikki at bera til hjá trolarunum at sigla framvið dýrum fiski inni á grunninum fyri at fiska bíligan fisk úti til havs.

– Og alt sum eitur at gera onkrar royndir, hóast tað kanska kostar ein dag, er eitt farið kapittul hjá lemmatrolarunum, sigur Henrik Old.



# Torbjørn situr veikari

*Nú alt grundarlagið undir málinum, sum gjørdi at Signar á Brúnni mátti fara frá sum landstýrismaður, nú er rapað, situr Torbjørn Jacobsen veikari í sínum nýggja landsstýrissessi. Tað heldur Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins*




*Sambært Heina O. Heinesen, formanni í tingbólki Tjóðveldisfloksins, slepst ikki undan, at Torbjørn Jacobsen situr veikari nú, enn áðrenn kanningin av embætisførsluni hjá Signari á Brúnni varð kunngjørd*

RÚNAR REISTRUP

Torbjørn Jacobsen fer neyvan at víkja sessin fyri tí nú reinsaða Signari á Brúnni, men hann situr ikki eins sterkur og hann gjørdi, áðrenn niðurstøðan hjá kanningarstjóranum varð kunngjørd týsdagin.

Hetta heldur Heini O. Heinsesen, sum allatíðina hevur verið vísur í, at Signar á Brúnni ikki hevur gjørt nakað kriminelt, sum hann orðar seg.

– Eg hevði allatíðina væntað, at Signar fór at verða reinasaður í so máta, men at hann fór at verða púra fríkendur fyri at hava verið upp á kant við stýrisskipanarlógina, tað hevði eg ikki væntað.

– Løgtingsgrannskoðarin segði púra greitt, at Signar á Brúnni hevði verið upp á kant við stýrisskipanarlógina, og tað arbeiddu vit so útfrá. Men so kemur kanningarstjórin og sigur, at Signar ikki hevur gjørt nakað skeivt sæð út frá stýrisskipanarlógini. Tá skilji eg ikki hvussu løgtingsgrannskoðarin kann koma til hasa niðurstøðu, sigur Heini O. Heinesen.

### Forhastað avgerð

Hann heldur framvegis, at tað var ein forhastað avgerð at seta Torbjørn Jacobsen í landsstýrissessin so stutt undan at kanningarstjórin kom við sínari frágreiðing.

Tað var ikki ein samdur Tjóðveldisflokkur, sum tók ta avgerðina, og sjálvur leggur formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins ikki lok á, at hann var ein teirra, ið var ímóti at skunda undir setanina av nýggjum landsstýrismanni.

Men gjørt er gjørt, og tað verður neyvan broytt aftur. Tjóðveldisflokkurin tekur nýggju støðuna upp til viðgerðar, men Heini O. Heinesen heldur tað vera lítið sannlíkt, at stórt meira fer at henda í málinum

### Gekk ov seint

Formaðurin í tingbólki Tjóðveldisfloksins, hevur hug at geva sjálvari stýrisskipanarlógini sín part av skyldini fyri, at so nógv rok hevur staðist av málinum um eykajáttanina til SvF.

– Eg haldi ikki, at stýrisskipanin er nóg góð. At tað skal krevja eina so langa kanning at fáa greiðu á, um ein landsstýrismaður hevur gjørt nakað kriminelt ella ikki, tað kann ikki vera rætt, sigur Heini O. Heinesen, og útilokar ikki, at hevði úrslitið av kanningini komið eitt sindur fyrr, so kundi tað havt bjargað Signari á Brúnni.

– Sat eingin í landsstýrissessinum, so hevði Signar helst verið sjálvfylgdur at tikið við honum aftur, nú hann er reinsaður, sigur Heini O. Heinesen.

*Torbjørn Jacobsen:*

# Eg kenni meg ikki veikari

*Sambært sitandi landsstýrismanni í undirvísingar- og mentamálum, Torbjørni Jacobsen, er støða hansara í landsstýrinum óbroytt, hóast kanningarstjórin týsdagin reinsaði Signar á Brúnni*

RÚNAR REISTRUP

Týsdagin varð Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður, reinsaður fyri ákærurnar um at hava brotið stýrisskipanarlógina.

Men hann sleppur neyvan aftur í landsstýrið, tí beint undan ólavsøku varð Torbjørn Jacobsen settur sum landsstýrismaður og yvirtók harvið málsøkini, sum Signar á Brúnni røkti, til hann fór frá í vár.

Torbjørn Jacobsen var sjálvur av heitastu talsmonnum fyri, at Signar á Brúnni skuldi frá, eftir at løgtingsgrannskoðarin var komin til ta niðurstøðu, at Signar hevði brotið stýrisskipanarlógina.

Men spurdur um tað ikki kennist eitt sindur løgið, sjálvur at sita í stólinum hjá Signari á Brúnni, ið hann var fortalari fyri skuldi fara frá, nú Signar er vorðin reinsaður, sigur Torbjørn:

– Eg segði bara tað, at um so var, at Signar á Brúnni hevði brotið stýrisskipanarlógina, so var tað rætt at hann fór frá. Tað var líkamikið um tað var Signar á Brúnni ella onkur annar landsstýrismaður. Tað var prinsippi í tí, at hevur ein landsstýrismaður brotið lógina, so eigur hann at fara frá. Tað var ikki eg sum koyrdi Signar frá, og eg havi einki útistandandi, sum eg skal føla meg illa um.

### Í somu støðu sum fyrr

Nýggi landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum kennir seg heldur ikki veikari, hóast grundarlagið undir ákærunum ímóti Signari á Brúnni og soleiðis eisini undir at landsstýrissessurin gjørdist leysur, nú er rapað.

– Eg kenni meg vera í somu støðu nú, sum tann dagin tá avgerðin varð tikin, um at eg skuldi vera landsstýrismaður. So leingi sum eg ikki havi fingið annað signal frá flokkinum, so broytist tað ikki, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hann heldur ikki at tað í sjálvum sær hevur ávirkan á sína støðu sum landsstýrismaður, at Signar á Brúnni er vorðin reinsaður fyri ákærurnar, sum løgtingsgrannskoðarin legði á hann.

Tað var ein avgerð hjá flokkinum at eg skuldi vera landsstýrismaður, og tað má vera flokkurin, sum tekur avgerð um hvør mín framtíð í landsstýrinum verður.

Torbjørn Jacobsen sigur seg einki vita um hvat flokkurin ætlar at gera burtur úr nýggju støðuni.

ÚTSØLA
byrjar fríggjadagin 4. aug. kl. 08.00
ALT
1/2 prísur
NOA NOA
TRANSIT PAR-SUCH
FLYING A
TONE BARKER
Opið er til kl. 19.00
29
Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99